# Big Ben

Eitt hitt kendasta merki í øllum London er Big Ben. Stóra klokkan í The Clock Tower liggur í landnyrðingshorninum av Houses of Parliament í Westminster í London. Vanliga verður tornið alt nevnt Big Ben, men hetta er ikki rætt, tí tað er bert klokkan sjálv, sum hevur hetta navnið. Tornið sjálvt nevnist the Clock Tower. Tornið var lagt í oyðu í einum stórum eldi náttina til 22. oktober 1834, tá alt Palace of Westminster brendi í grund.
Nýggja tornið er 96,3 metrar høgt. Fyrstu 61 metrarnir eru gjørdir av múrsetini, meðan restin av torninum er gjørd úr stoypijarni. Tornið er gravað fýra metrar niður í jørðina og tær fýra klokkurnar liggja í 55 metra hædd.
Orsakað av jarðarviðurskiftunum hellir tornið 220 millimetrar í ein landnyrðing. Tornið sveiggjar nakrar fáar millimetrar eyst og vest um árið.















Les meiri um tilboð á www.gjaargardur.fo

GJÁARGARÐUR
Guesthouse of Gjógv

Tel. 42 31 71
Fartel. 21 15 90
info@gjaargardur.fo
www.gjaargardur.fo




Tel. 778877 · info@hotel-runavik.fo · www.hotel-runavik.fo




